# Bilmekanikarum dáma væl dýrar bilar

PRAKTIKANTAR
*Rannvá Danielsen*
*Jytta Drangastein*



Í seinastu viku tóku tríggir bilmekanikarar sveinaprógv. Teir eru Heini Christensen av Argjum, Sonni á Horni úr Fuglafirði og Vagnur Skúvadal úr Vestmanna. Vit hava tosa við teir hvat teir halda um bilar og at arbeiða við bilum.

Fyrst ringdu vit til 26 ára gamla Heina. Hann lærdi hjá Sp/f Eyðbjørn Hansen í Havn.

Hví vildi tú verða bilmekanikari?

– Eg havi áhuga fyri bilum.

Er tað sum tú hevði vænta?

– Ja, nøkulunda.

Hevur tú prøva at arbeitt á einum verkstaði áðrenn tú fór í læru?

– Ja, á klárgerðingarverkstaði í Danmark.

Og hvat er heimsins lekrasti bilur?

– BMV

Síðani tosaðu vit við 22 ára gamla Sonna. Hann er enn í læru og er hjá ENM-Bilsmiðjuni í Leirvík.

Hvat er tað besta við at vera bilmekanikari?

– Mær dámar tað væl.

Hvat er tað ringasta við at vera bilmekanikari?

– Tá fólk grenja og standa uppyvir tá ið eg arbeiði.

Hví vildi tú vera bilmekanikari?

– Eg havi altíð dámt tað væl, síðan eg var 14–15 ára gamal.

Er tað so sum tú hevði vænta?

– Ja, tað er tað.

Hevur tú prøva at arbeitt á einum bilverkstaði áðrenn tú fór í læru?

– Ja, á einum bilverkstaði í Fuglafirði í 1 1/2 ár.

Hvat er heimsins lekrasti bilur?

– Porche 911.

Hví?

–Mær dámar hann ógvuliga væl. Kanska tí at eingin er í Føroyum.

Seinast tosaðu vit við 24 ára gamla Vagnur. Hann lærir hjá P/f Meinhardt Arge í Havn.

Nær er tað best at vera bilmekanikari?

– Tá ið alt gongur sum tað skal.

Nær er tað minni gott at vera bilmekanikari?

– Tá ið man ikki hevur nóg nógvar kundar og kundarnir klaga.

Hví vildi tú verða bilmekanikari?

– Tí mær dámar væl at pilla við, skrúva sundur og seta saman aftur.

Er tað sum tú hevði vænta?

– Kanska ikki akkurát.

Hví?

– Tí at tað er ikki so mekaniskt longur, nú er tað meira elektriskt.

Hevur tú prøva at arbeitt á einum verkstaðið áðrenn tú fór í læru?

– Ikki nakað serligt.

Hvør er heimsins lekrasti bilur?

– Hommer.

Hví?

– Tí tað er ein bilur sum kann alt og kann koyra á øllum støðum.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av eystri ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 13 og 16 stig, men har mjørki er, um 10 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fleyr til gul av landnyrðingi ella av ymsum ættum og møguliga sirm og mjørki, men eisini onkur sólglotti. Somu hitaviðurskifti.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og sum frálíður regn og mjørki. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Fyrst strúkur í vindi av útsynningi, men sunnudagin upp í skrið av landsynningi. Stundum regn ella ælingur og hitin millum 6 og 10 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 5 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | – |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 12 |
| Tromsø | 11 |
| Bergen | 18 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 17 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 12 |
| Warzawa | 14 |
| Kiev | 20 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 13 |
| Madrid | 23 |
| Róm | 17 |
| Malorca | 21 |
| Athen | 26 |
| Malta | 24 |
| Tunis | 26 |
| Beijing | 24 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 22 |
| New York | 23 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 33 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 15 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst, 1030 hPa. við Føroyar viknar nakað. Eitt lágtrýst, 1012 hPa. í útsynning úr Írlandi fer móti Íslandi.




Ein hátrýstryggur frá havinum vestan fyri Írland til Mið-Skandinavia gevur góðveður á okkara leiðum einar 2 dagar afturat.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 17/09 kl. 06[00]– 18/09 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 10,6°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 17/09 kl. 06[00]– 18/09 kl. 06[00]
Avfallið higartil í september: 47,3 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

16. sept.: Mánin næstur jørðini
17. sept.: Tendring
24. sept.: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 19. sep | 08.51 | 21.16 | 07.51 | 20.16 | 08.06 | 20.31 | 10.51 | 23.16 | 11.51 | — | 07.06 | 19.31 | 06.06 | 18.31 | 09.06 | 21.31 | 10.06 | 22.31 | 08.36 | 21.01 | 09.51 | 22.16 |
| 20. sep | 09.40 | 22.05 | 08.40 | 21.05 | 08.55 | 21.20 | 11.40 | — | 00.16 | 12.40 | 07.55 | 20.20 | 06.55 | 19.20 | 09.55 | 22.20 | 10.55 | 23.20 | 09.25 | 21.50 | 10.40 | 23.05 |
| 21. sep | 10.30 | 22.55 | 09.30 | 21.55 | 09.45 | 22.10 | 00.05 | 12.30 | 01.05 | 13.30 | 08.45 | 21.10 | 07.45 | 20.10 | 10.45 | 23.10 | 11.45 | — | 10.15 | 22.40 | 11.30 | 23.55 |
| 22. sep | 11.20 | 23.45 | 10.20 | 22.45 | 10.35 | 23.00 | 00.55 | 13.20 | 01.55 | 14.20 | 09.35 | 22.00 | 08.35 | 21.00 | 11.35 | — | 00.10 | 12.35 | 11.05 | 23.30 | — | 12.20 |